# ársins poppveitslu

**Ein av mest spennandi nøvnunum í europeiskum popptónleiki í løtuni er Alphabeat, og tey eru rúkandi heit, nú tey koma til Føroya at spæla**



skrivað nógv framúr góð løg, og tað royna vit eisini, sigur songkvinnan Stine Bramsen.

## Gingið støðugt framá

Tað eru liðin seks ár, síðani Alphabeat varð stovnað. Tónleikararnir í bólkinum hittust á studentaskúla, og tá teir manglaðu ein kórsangara, varð Stine Bramsen tikin við í bólkinum. Seinni gjørdist hon tó til forsangara saman við Anders SG.

Í 2005 Alphabeat plátusáttmála í Danmark, og fyrsta útgávan hjá teimum var sera væl móttkin, tá ið hon kom út í 2007. Útgávan hjá teimum hevði eisini við sær, at boð vóru eftir bólkinum í útlandinum, og síðani á heysti í fjør hava tónleikararnir í Alphabeat búð í London, so tey hava kunnað lagt alla orku í at fáa gjøgnumbrot í Bretlandi.

Og tað hevur gingið væl. Bólkurin hevur verið á drúgvari konsertferð, og skal aftur kring Bretland og Europa annars at spæla í heyst. Í juni mánaði kom fyrsta útgávan hjá Alphabeat í Onglandi, og hon fekk framúr góð ummæli og klatraði upp á tónatindarnar.

## Skapa gott lag

Alphabeat hevur ferðast víða við sínum tónleiki seinasta árið, og allastaðni, har tey spæla, er ein felagsnevnari fyri ummælini. Alphabeat skapar gleði, smíl og veitslulag rundan um seg.

Tónleikurin hjá teimum er glaður og lættur popptónleikur, men ikki av tí slagnum, sum fólk verða troytt av. Sangirnir halda allan vegin, og dygdin er so stór, at ummælarar halda, at Alphabeat skapar nakað av tí besta popptónleikinum, sum finnist í Europa í løtuni.

Og hetta sleppa føroyingar at uppliva, tá ið Alphabeat leygarkvøldið fer at spæla til ársins poppveitslu í Føroyum.

**- Onkur hevur samanlíknað okkum við ABBA, og tað eru vit fegin um. ABBA skrivaði nógv framúr góð løg, og tað royna vit eisini, sigur songkvinnan Stine Bramsen**



## Spice Girls

**Alphabeat er ein nýggj veitsla. Tí vil bólkurin ikki setast í bás saman við Spice Girls, segði eitt umboð fyri Copenhagen Records við Gaffa.**

**Men møguliga kunnu tey í Alphabeat nú sleppa at heilsa upp á ein av sangarunum í Spice Girls. Melanie C spælir nevniliga eisini á Summar Festivalinum í ár.**

## Í góðum formi

Alphabeat hevur spælt sera nógv live seinasta árið. Bólkurin hevur verið á drúgvari konsertferð í Bretlandi, og tey hava eisini verið heima í Danmark og spælt til stór tiltøk – millum annað Roskilde Festivalin herfyri.

Danska tónleikatíðarritið Gaffa skrivar um framførsluna, at fólkini í stúgvandi fulla tjaldinum, har Alphabeat spældi, larmaðu so illa, at tað í løtum var trupult at hoyra tónleikin. Bólkurin skapti enn eina ferð eina rimmar veitslu við sínari framførslu, og sterkasta vápnið hjá bólkinum er sambært Gaffa teir løttu og framúr íoyrafallandi sangirnir.

Ummælarin hjá Gaffa skrivar, at hann nakrar ferðir kjakast við sínar starvsfelagar, um Alphabeat bert klárar at skapa eitt hitt ella tvey, og so eru tey liðug, men hann heldur, at eftir hesa framførlsuna, so er hann als ikki í iva um, at Alphabeat eigur nógv hitt afturat.

- Alphabeat endaði veitsluna við risahittinum Fascination, og tey blivu doyvd av tí ekstatisku áhoyrarafjøldini. Tað er nakað av einari viðurkenning frá eini áhoyrafjøld, sum er kræsin. Vaksandi altjóða succesin hjá Alphabeat er væl uppiborin, skrivar Gaffa í sínum ummæli.

## Skrivaðu søgu

Poppbólkurin Alphabeat gongur sigursgongd í Bretlandi, har nýggja útgávan hjá bólkinum streyk inn á topp 10. Seinastu 50 árini er tað bara tvær ferðir áður eydnast einum donskum bólki at koma inn um topp 10 á bretska hitlistanum. Fyrru ferð vóru Nina & Frederik í 1960, og seinnu ferð vóru tað Aqua í 1997. Og fyrr í ár tók Alphabeat stóra stigið á bretska hitlistanum.